# 25 ára starvsdagur í Føroya Banka

Hósdagin 3. august hevði Sigmar Jacobsen arbeitt í Føroya Banka í samfull 25 ár.

Sigmar fór í læru í Føroya Banka í Havn 3. august 1981 og tók samstundis HMX-skúlan á Føroya Handilsskúla í eitt ár. Tá var skúlagongdin um kvøldið í Kommunuskúlanum og úti á Fiskasøluni. Í 1983 var hann útlærdur.

Hann tók eisini bankaskúla í fýra ár. Sum 24. ára gamal, í 1986, varð hann útnevndur til fulltrúa og leiðara fyri nýstovnaðu deildini við Norðskála. Hann hevur havt nógvar ymiskar uppgávur gjøgnum árini – tó mest innanfyri útlánsvirksemi bankans. Nevnast kann, at Sigmar hevur arbeitt á 28 ymiskum deildum, heilt frá Eiði í norð og suður til Vágs. Í kreppuárunum arbeiddi Sigmar eitt skifti í Klaksvík, á Tvøroyri og í Vágum.

Tá bankarnir vóru samanlagdir 11. apríl 1994 varð hann deildarleiðari í Vágum í eitt gott ár. Hevur síðani arbeitt í Vinnulívsdeild bankans og Kredittdeildini. Í dag arbeiðir Sigmar í Stjórnarumsitingini.

Í hesi 25 árini hevur Sigmar arbeitt undir 8 stjórum: Esbern Simonsen, sála, Hans Jørgen Laursen, Jóhan Simonsen, Niels Juel Nattestad, Tage Benjaminsen, Jørn Astrup Hansen, Janus Petersen og Súna Schwartz Jacobsen.

Sigmar hevur eisini tikið víðkaða bankaskúlan og fleiri fak í merkonomútbúgvingini, umframt eitt ótal av skeiðum.

Hevur sitið í nevnd bankans í 3 ár, sum starvsfólkavaldur nevndarlimur, og er júst valdur fyri eitt nýtt 4 ára skeið.

Í sambandi við European Business Game-kappingina í Føroyum hevur Sigmar verið dómari øll árini uttan tað fyrsta, umframt at hann hevur umboðað Føroyar, sum dómari í tí internationalu EBG-endakappingini á hvørjum ári, nú seinast í Kroatia í summar.

Sigmar er føddur í Leirvík í 1962, sonur Elsu, f. Lervig, úr Leirvík, og Brynjolf Jacobsen, av Syðradali á Kallsoynni, sum var lærari í Leirvík í mong ár og seinni stjóri í Norðoya Sparikassa. Brynjolf doyði í 1999. Omman í faðirættina var Kittan, ljósmóðir í Klaksvík og abbin, Edvin, kom av Valinum á Tvøroyri. Í móðirættina komu bæði omman, Karolina, og abbin, Jógvan Ernst, úr Leirvík. Beiggjarnir hjá Sigmar eru Ernst Jacobsen, stjóri í ALS, sum býr í Tórshavn og Kristvin Jacobsen, kendi sjónvarpskokkurin, sum nú arbeiðir sum kokkur á Føroya Tele og býr á Argjum, eins og Sigmar.

Sjólívið hevur hann eisini roynt, bæði við troli undir Føroyum og eftir skittfiski í Norðsjónum. Leirvík hevur altíð verið útróðrarbygd og nógv var at egna aftaná skúlatíð og leygardagar. Hann plagdi at egna fast hjá Petur á Regni. Nógv arbeiði var eisini í 70-unum á flakavirkinum Frost í Leirvík, bæði við at landa bátar, avskipa, salta fisk, ríva um og annað fyrifallandi og munnu ikki so fá oyru verða forvunnin har. Í aðrar mátar var Sigmar eisini virkin innan skótaliðið hjá Leirvíks Pálli í Leirvík frá 1974 og 12-14 ár fram við nógvum virksemi og legum, bæði her heima og burturi, serliga í Onglandi. Í Nottingham var hann tríggjar ferðir, har teir hava vinir enn í dag.

Sigmar flutti til Havnar í 1978, tá hann fór á studentaskúla, eftir at hann fyrst hevði gingið 7 ár í barnaskúla í Leirvík og síðani 3 ár í realskúla í Fuglafirði. Í 4 ár búði hann hjá Hildu Fossá í C. Pløyensgøtu í Havn, sum hevði pensionat. Flutti eitt skifti aftur til Leirvíkar í 1985-87, tá hann tók við leiðarastarvinum við Norðskála. Hevur síðani 1987 búð á Argjum í góðum grannalagi.

Annars hevur Sigmar havt onnur álitisstørv, eitt nú sum nevndarlimur í Dagstovninum á Argjum í 4 ár, nevndarlimur og kassameistari í LÍF í 2 ár, eins og nevndarlimur og kassameistari í Argja Bóltfelag í 7 ár, har hann situr enn. Onkrar minni grannskoðarauppgávur hava eisini verið. Ítróttturin fer tó við tí mesta av frítíðini. Av øðrum áhugamálum er flogbóltur – har hann spælir við oldboysfelagnum Hugflog á Argjum, og at fiska síl og ganga á fjall. Vanliga gongur hann á fjalli í Leirvík hjá mammubeiggjanum Jógvan á Húsamørk. Eru grindaboð, liggur hann ikki leingi á boðunum. Eisini hevur hann góðan hug at ferðast og ikki minst út í heimi.

Sigmar er giftur við Nancy Splidt Jacobsen, úr Tórshavn, ið starvast innan Heimarøktina, børnini eru: Bjørt 25 ár, sum nú byrjar sum næmingur í bankanum, Anna 24 ár, sum lesur í Århus, Dion Brynjolf 17 ár, sum byrjar í studentaskúlanum og Elsa 11 ár, sum gongur í Argja skúla. Abbasonurin Sigbrandur er 5 ár.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at okkara elskaða mamma, vermamma og omma

**Ásla Ólavsdóttir Olsen**
Søldarfirði

andaðist á Eysturoyar Røktar og Ellisheimi, fríggjadagin 11. august, 78 ára gomul.

Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Familjunnar vegna*
**Malena og Ólavur**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at elskaði pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

**Poul Andreas Hansen**
á Skála

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 10. august, 90 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjakvøldið kl. 19.00.
Jarðarferðin verður úr Skála kirkju sunnudagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Elias, Andrass og Magnus**

*Tey, sum vilja minnast Poul Andreas við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Meinigheitshúsið á Skála.*

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ebba Klein**, Havn, ættað av Argjum, andaðist í heiminum mikudagin 9. august, 81 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin klokkan 15.

**Olaf Johan Olsen** á Lava, andaðist 9. august, 95 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá okkara høgt elskaði maður, pápi, abbi, verpápi og bróðir

**Marius A. Rubeksen**
fjarritari, Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á G4.
Tøkk til Sverra Steinhólm prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk fyri vitjanir og uppringingar.
Tøkk fyri blómur, kransar, fjarrit og kort.
Tøkk til tykkum mongu, ið lótu eina gávu til Føroya Felag móti Krabbameini.
Og tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Rhoda**
**Bjarni og Guðrun v/ fam.**

---

# Tøkk

Hjartaliga tøkk fyri sýnda samkenslu, tá kæra fastur, mostir, abba- og ommusystur og langabba- og langommusystir okkara

**Poulina S. Poulsen**
Eiði

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum í Korndalsbýlinum á Eiði, somuleiðis tøkk til G4 á Landssjúkrahúsinum og tykkum á Røktar- og Elilsheiminum í Runavík fyri góða umsorgan og hjálpsemi.
Tøkk til Emil Olsen, prest fyri vøkur orð.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Takk fyri heilsanir, blómur, kransar og tykkum, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi*
**Hans Jákup**

---

†

Kunngjørt verður at okkara kæra mamma, vermóðir, omma og langomma

**Elsebeth Sofie Klein (Ebba)**
Tórshavn

andaðist í heiminum mikudagin 9. august 2006, 81 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin 12. august kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin 13. august kl. 15.00.

*Familjunnar vegna*
**Kathrina, Niels Jacob og Poul**